## Bygdaleiðir nýtt steðgistað

Í sambandi við Summar Festivalin steðga allar leiðir hjá Bygdaleiðum í Klaksvík við bátabrúgvarnar. Vanliga koyra bussarnir hjá Bygdaleiðum til og frá Sandinum, men hetta økið verður brúkt í sambandi við Summar Festivalin, og tí koyra bussarnir hjá Bygdaleiðum ikki á Sandin næstu dagarnar. Ístaðin verður nýggja steðgiplássið hjá bussunum við Bátabrúgvarnar – millum gomlu Bilstøðina og Statoilstøðina. Eisini steðga bussarnir á Skúlavegi. Broytingin er galdandi frá týsdegnum 31. juli til 8. august.

## Armbondini fáast nú

Nú er tíðin komin til at skifta atgongumerki til Summar Festivalin um við eitt armband, ið allir festivalgestir skulu hava á arminum. Hetta armband kann nú fáast upp á armin í Telebúðini í Klaksvík og í Telebúðini í Havn. Í Telebúðini í Havn verður hetta markerað við live tónleiki. Týsdagin og mikudagin millum kl. 15.00 og 17.00 kunnu armbondini fáast, og tá ber eisini til at fáa eina smakkiroynd av tónleiki frá Summar Festivalinum. Týsdagin spælir Brandur Enni, og mikudagin verður Jens Marni Hansen at hoyra. Í Telebúðini í Klaksvík ber til at støkka inn á gólvið í vanligu upplatingartíðini og fáa armbandið uppá.

# - Fólkaatkvøða er at renna undan ábyrgd



*Næsta fólkaatkvøðan eigur at verða um grundlóg, fullveldi ella ES, sigur Sonja Jógvansdóttir, stjórnmálafrøðingur*

**Spurningurin um eitt ella fleiri valdømi er ov lítil at senda út til fólkaatkvøðu. Hetta sigur stjórnmálafrøðingurin Sonja Jógvansdóttir, ið vísir á, at politikararnir eru valdir bæði at taka populerar og ópopulerar avgerðir**

VALSKIPAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Næstu ferð vit skulu hava fólkaatkvøðu, eigur hon at verða um grundlóg, fullveldi ella ES.

Hetta sigur stjórnmálafrøðingurin Sonja Jógvansdóttir, sum ikki tekur undir við uppskotinum hjá løgmanni um at hava fólkaatkvøðu, um Føroyar skulu verða eitt valdømi.

- Hetta er fyri at politikararnir skulu sleppa at spæla fríspæl og ein lættur máti at sleppa undan politiskum tvídrátti, sigur Sonja Jógvansdóttir. Hon heldur at hetta er ein máti at sleppa frá at taka ábyrgd, og vísir á, at vit velja okkara politikarar at taka bæði populerar og ópopulerar avgerðir, og at tey fólkavaldu fáa løn fyri hetta.

### Tekniskur spurningur

- Makta tey ikki hetta, eiga tey heldur helda seg burtur, sigur Sonja Jógvansdóttir, sum hevur tað sjónarmið, at vit ikki eiga at hava fólkaatkvøður »í fleng«, sum hon málber seg.

Eitt nú í Sveis er vanligt at hava fólkaatkvøður. Sonja Jógvansdóttir viðgongur, at hon ikki kennir nágreiniliga til viðurskiftini í Sveis, men vísir á, at vanliga møta ikki so nógv fólk til hesar atkvøður.

Stjórnmálafrøðingurin metir, at tað kann tykjast bráðræsið at taka eina slíka avgerð í oktober ella november, og síðan nýta hetta í verki í januar. Hinvegin kunnu broytingar ofta skjótt fáast at virka í smáum økjum sum t.d. Føroyum og Íslandi.

Sonja Jógvansdóttir heldur, at málið um nýggja valskipan er heldur ein tekniskur enn kensluligur spurningur, og tí himprast hon ikki við at siga, at hon vónar ikki uppskotið hjá løgmanni er úrslit av ráðgeving frá embætisfólkum í Tinganesi.

- Eg hopi ikki at hetta er tann embætisliga ráðgevingin í Tinganesi, sigur Sonja Jógvansdóttir.

## Fólkaatkvøða avgjørt ein møguleiki

**Edmund Joensen, løgtingsformaður, ímyndar sær, at uppskotini um eitt valdømi og fólkaatkvøðu kunnu viðgerast undir einum longu í heyst**



*Edmund Joensen ætlar sær enn at leggja uppskotið um eitt valdømi fram í heyst. – Tað hevði verið upplagt at samskipa tað við eitt uppskot um fólkaatkvøðu, so tingið sleppur at siga sína hugsan um tað eisini*

VALSKIPAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í røðu sínari á ólavsøku boðaði løgmaður frá, at uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi, eigur at verða lagt út til fólkaatkvøðu.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, sum hevur tikið stig til at leggja uppskotið fyri tingið í heyst, vísir als ikki aftur, at lata málið út til fólkið at gera av.

- Eg ætli mær undir øllum umstøðum at leggja uppskotið um eitt valdømi fyri tingið sum ætlað, men ímyndi mær, at tað hevði verið lagamanni at samantvinna framløguna og viðgerðina við eitt uppskot um fólkaatkvøðu, sigur Edmund Joensen. Hann metir, at so vórðu málini lýst væl og virðiliga í tinginum, og at tað tá hevði verið tingið, sum slapp at senda málið til fólkaatkvøðu.

### Samskipa uppskotini

Í Sosialinum í gjár róði løgmaður framundir, at tað kanska hevði verið skilabest at bíða við málinum til eftir valgið. Tí hóast hann tók undir við einum valdømi, metti hann vanda vera fyri, at valstríðið hjá flokkunum og samgonguni verður ov nógv merkt av orðaskiftinum um eitt valdømi.

Løgtingsformaðurin sigur seg onga viðmerking hava til hesar tankar løgmans, tí sum hann sigur: Lat tað vera upp til tingið at gera av, nær ein møgulig fólkaatkvøða eigur at vera.

- Og eg ímyndi mær, at tað saktans ber til at samskipa uppskotið hjá mær um eitt valdømi, við eitt uppskot um fólkaatkvøðu, sum landsstýrið eigur at lata tinginum til viðgerðar, sigur Edmund Joensen.

# Tom røða

**Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, var ikki bergtikin av ólavsøkurøðu løgmans. Kortini fegnast hann um, at heili tvey uppskot hjá Miðflokkinum, sum áður hava verið feld í tinginum, nú kortini tykjast verða veruleiki**

ÓLAVSØKURØÐAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, kundi hugsað sær fleiri framtíðarvisjónir ólavsøkurøðuni*

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, undrast á, at løgmaður ikki tosaði meira um framtíðina, nú hann hevur fingið eitt heilt idekatalog í Visjón 2015.

- Eg hevði væntað mær nógv fleiri visjónir um framtíðina, men her vóru næstan bara føgur orð um tað, sum farið er, sigur Jenis av Rana.

Kortini sigur hann seg fegnast um, at løgmaður nú hevur ætlanir um at senda spurningin um Føroyar sum eitt valdømi út til fólkaatkvøðu.

- Sum tey flestu helst vita, so er hetta eitt mál, sum eg taki undir við, og sum eg vóni at kann koma í gildi longu til komandi valg, sigur hann.

Jenis av Rana beit eisini merki í, at tvey uppskot hjá Miðflokkinum, sum tingið áður hevur felt, nú aftur vórðu tikin fram.

- Tað eru longu tvey ár síðani, at vit skutu upp at broyta viðurskiftini hjá teimum tímaløntu viðvíkjandi sjúkradøgum hjá børnum. So nú er bert eftir at vóna, at hetta gerst veruleiki sum skjótast, tí her eru tey tímaløntu fyri stórum mismuni, í mun til onnur á arbeiðsmarknaðinum, sigur Jenis av Rana.

Løgmaður segði eisini í røðu sínari, at samgongan fer at leggja uppskot fram um yvirtøku av útlendingamálinum.

- Hetta er eisini eitt mál, sum vit í Miðflokkinum løgdu fram fyri einum ári síðani. Men tá var tað felt við teirri grundgeving, at arbeitt verður við málinum. Tað er púra greitt, at tað ber als ikki til at donsk embætisfólk skulu avgera okkara útlendingapolitikk, sigur Jensi av Rana.

Av øðrum, sum formaður Miðfloksins legði til merkis, kann nevnast, at hann enn undrast á, at samgongan ikki fær skúlalæknaskipanina at virka, umframt at hann stórliga ivast í um lovaði bústaðarpakkin hjá landsstýrinum verður veruleiki í hesum valskeiðinum.